# egna leksikon



*Bókin er 439 blaðsíður við umleið 1.000 áhugaverdum og viðkomandi myndum*




*Týsdagin handaði Birgar, saman við konuni Elsu, fyrsta bindið av bókini til Heðin Mortensen, borgarstjóra, á Ráðhúsinum í Havn*

stovnar, handlar, alt slag av flutningi, skúlaverkið, heilsuverkið, ítróttar- og frítíðarfeløg, eins og tónleik og undirhald.

Birgar er havnarmaður við stórum H. Hann er eftir hondini vorðin ein slags magistari í havnarsøgu. Navnið Birgar verður ofta sett í samband við tónleikasendingar í útvarpinum og stórar framsýningar við gomlum fólksligum myndum og annars øllum frá Dandy-tyggigummi til Valor-petroleumsovnar. Hann samlar eisini upp á modellbilar, grammofonplátur, plakatir og nógv ymiskt annað. Justines Leivsson Eidesgaard sigur í fororðunum til bókina, at Birgar er ein hopleysur nostalgikari.

Tá Birgar fylti 60 ár í fjør, segði Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, m.a. í røðu síni til føðingardagsbarnið: "Birgar ger eitt stórt søguligt og mentanarligt arbeiði fyri býin við sínum fyrireikingum til eina leksikon yvir Havnina. Fyri ein bý sum Havnina hevur søgan alstóran týdning, og Birgar ger eitt stórt arbeiði fyri, at vit ikki skulu gloyma søguna, og tað ynskja vit at geva honum viðurkenning og eitt herðaklapp fyri".

Tað er einki dulsmál, at Birgar hevur ein serligan tokka til 60-ini. Hann sigur, at hetta tíggjuáraskeiðið fer altíð at vera nakað heilt serligt. So tann næsta bókin verður ikki minni spennandi.

Móttøkan verður mikudagin frá kl. 16-20, har bøkurnar eru til keyps, og Birgar signerar tær. Sama dag verður bókin at fáa í øllum bókasølum kring landið.